STUTT SAGT

## Fuglakrímið gagnar fiskaprísinum


*Fólk vilja hava fisk heldur enn høsnarungar*

Norska fiskivinnan hevur notið gott av fuglakríminum, tí í nógvum londum aftra fólk seg við at eta flogfenað so sum høsnarungar. Eitt nú eta fransmenn 40 prosent færri høsnarungar nú enn fyri bara nøkrum mánaðum síðani, og í summum pørtum av Italia er nýtslan minkað heili 70 prosent.

Nógvir fransmenn og italiumenn vilja hava fisk ístaðin fyri, og tað kemur norsku fiskivinnuni væl við, skrivar Aftenposten. Rolf Domstein, sum er formaður í fiskaútflutningsnevndini, sigur við blaðið, at fyra teir fyrstu mánaðarnar í ár hevur Noreg útflutt 10 prosent meiri fiskavørur enn í sama tíðarskeiði í fjør.

Rolf Domstein sigur, at teir nýggju keypararnir leggja stóran dent á góðskuna, og at teir eru til reiðar at rinda fyri góðskuna. Teir vilja eisini heldur hava feskan fisk enn frystan, sigur hann.

## Fara úr Irak

Suðurkoreanska stjórnin hevur gjørt av at taka ein triðing av sínum hermonnum úr Irak, og afturtøkan byrjaði í gjár.

Suðurkorea hevur 3.200 hermenn í Irak og er sostatt tað landið, sum hevur havt triðflestar hermenn har aftan á USA og Bretland. Men 1.000 teirra skulu haðani innan árslok, og teir fyrstu 40 fóru í gjár. Teir suðurkoreonsku hermenninir hava havt støð har norðuri í Irak, har teir m. a. hava havt ábyrgdina av at tryggja frið í býnum Ibril.

Tað var eftir trýsti frá politikarum og fólki yvirhøvur, at stjórnin í Seoul gjørdi av at fara undir afturtøkuna. Nógvir suðurkoreanar vilja hava hermenninar heimaftur, tí teir halda viðurskiftini í Irak vera alt ov ótrygg, skrivar AP úr Seoul.

## Dómurin var partískur

Norski njósnarin Arne Treholt fekk ikki rættvísa viðgerð, tá hann í 1985 varð dømdur fyri at hava njósnast fyri Sovjetsamveldið.

Tað sigur verji hansara, Harald Stabell. Hann vísir á, at tríggir av dómarunum í rættinum høvdu tilknýti til tann borgarliga flokkin Høgra, og at tað tískil var ein dómstólur við borgarligum grundhugsjónum, sum dømdi Treholt. Ein av dómarunum hevði verið stórtingslimur fyri Høgra, og tveir aðrir høvdu tilknýti til flokkin, og tað heldur Harald Stabell vera í stríð við grein seks í evropeiska mannarættindasáttmálanum, sum tryggjar øllum rætt til at fáa síni viðurskifti viðgjørd í einum óheftum og ópartískum dómstóli.

Verjin vísir í hesum sambandi á eitt svenskt rættarmál, har ein dømdur kærdi úrskurðin, tí nakrir av dómarunum høvdu havt tilknýti til sosialdemokratarnar. Maðurin fekk viðhald í evropeiska mannarættindadómstólinum.

Harald Stabell vil tí hava dómsvaldið at taka málið ímóti Arna Treholt uppaftur. Tað hevur hann roynt tvær ferðir fyrr, men básðar ferðirnar hevur hægstirættur havnað kravi hansara.

## Fekk endurgjald fyri hund

Ein maður í West Palm Beach í USA hevur fingið 8.000 krónur í endurgjaldi, tí ein pytonslanga drap hund hansara.

Tann 3,3 metrar langa slangan var sloppin úr búri sínum, og tá hon fekk eyga á ein mann og ein hund uttanfyri, legði hon á hundin og beit hann í høvdið. Maðurin royndi at sláa slanguna við einum golfstavi, men uttan úrslit. Tað eydnaðist kortini hundinum at sleppa til rýmingar, men dagin eftir varð hann funnin deyður.

Hundaeigarin stevndi myndugleikunum í Florida. Teir vildu vera við, at hundurin kundi vera deyður, tí at eigarin hevði rakt hann við golfstavinum, men tað helt dómarin ikki og álegði statinum at rinda manninum 8.000 krónur í endurgjaldi.

UTTAN ÚR HEIMI

# Misnøgdur Berlusconi forðar forsetavali

**Skal Italia fáa nýggjan forseta, skulu tveir triðingar av Senatinum atkvøða fyri, men Berlusconi vil ikki styðja valevnið hjá stjórnini**

ITALIA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


*Silvio Berlusconi sigst vera so vónsvikin av ósigrinum herfyri, at hann forðar bæði forsetavali og stjórnarskipan*

18. mai fer tann 85 ára gamli Carlo Ciampi frá sum italskur forseti, men tað kann fara at taka sína tíð at finna hansara eftirmann. Ikki tí at einki uppskot er, men heldur tí at politikararnir kunnu ikki semjast um, hvønn teir skulu velja.

Meirilutasamgongan hjá Romano Prodi hevur skotið upp at velja vinstrademokratin Massimo d'Alema til forseta, meðan tann borgarligi minnilutin vil hava fyrrverandi politiska ráðgevan Gianni Letta í embætið. Sum eina neyðloysn hevur Prodi skotið upp at velja tann 80 ára gamla senatorin Giorgio Napolitano, men hann er fyrrverandi kommunistur, og tí vil tann høgrasinnaði Liga Nord-flokkurin ikki hoyra talan um, at hann verður forseti.

Italska stýrisskipanin sigur, at forsetin skal fáa minst tveir triðingar av atkvøðunum í Senatinum, har meirilutin hjá Romano Prodi hevur 159 umboð og minnilutin hjá fráfarandi forsætisráðharranum, Silvio Berlusconi, 156.

Sambært italskum fjølmiðlum hevur Berlusconi so ilt við at viðurkenna ósigurin á valinum herfyri, at hann er til reiðar at leggja meirilutanum allar meinbogar í vegin. Í so máta kann hann forða øllum, tí í fyrra lagi verður eingin forseti valdur, uttan at hansara flokkar atkvøða fyri, og í øðrum lagi kann Romano Prodi ikki skipa stjórn, fyr enn forsetin er valdur. Tí stýrisskipanin sigur, at tað er forsetin, sum skal biðja meirilutaleiðaran skipa stjórn.

So hóast Berlusconi tapti valið, hevur hann framvegis buktina og báðar endarnar. Longu beint eftir valið segði hann, at hann ætlaði sær ikki at rudda nakra gøtu fyri sín eftirmann, og tað hevur hann eisini víst síðani, skrivar AP. Summir italskir fjølmiðlar halda, at hann í veruleikanum roynir at skipa so fyri, at hann sjálvur skal taka við sum forseti.

# Veðurlagsbroytingar hótta fleiri bygdir í Alaska

**Ísurin hvørvur, og um stutta tíð fara fleiri bygdir at skola út.**

VEÐURLAG
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Veðurlagsbroytingarnar eru av álvara farnar at gera vart við í fleiri inuittabygdum í Alaska, skrivar blaðið Anchorage Daily News.

Fyrr vardi havísurin bygdirnar, men nú er ísurin minkaður, og tað ger, at brimið skolar longri og longri niðan í bygdirnar. Nógvastaðni er støðan so álvarssom, at vandi er fyri, at hús, skúlar og flogvallir fara at skola út, skrivar blaðið.

Tey seinastu árini hava amerikonsku myndugleikarnir tosað um at flyta tær bygdirnar, sum eru ringast fyri, men tað hevði kostað fleiri hundrað milliónir dollarar, og tí er tann ætlanin slept.

Ístaðin fyri arbeiða myndugleikarnir við einari ætlan um at gera nýggjan veg til bygdirnar, so fólk kunnu sleppa til rýmingar, um illa vil til, skrivar Anchorage Daily News.